## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur. Yvirhøvur turt, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur av suðri. Regn av og á og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassann vind av suðri og útsynningi og stundum regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Jens Marni ætlar sær í toppin



**- Sangurin sparkar reyv, og tað sær lovandi út við okkara framførslu, so eg rokni við, at eg kann koma upp í toppin, sigur Jens Marni Hansen um sangin, hann skal luttaka við í danska Grand Prixnum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrrapartin varð kunngjørt, hvørjir luttakararnir í danska Tónleika Grand Prixnum 2010 eru. 10 solistar skulu kappast um at sleppa til europeisku kappingina, sum í ár verður hildin í Noregi. Og ein av teimum er kollfirðingurin Jens Marni Hansen.

Hann er kendur tónleikari í Føroyum, men nú sleppa danir eisini at hoyra hansara eyðkendu rockrødd.

Jens Marni skal syngja sangin Gloria, sum er ein popputur rocksangur. Sangskrivari er millum annað Noam Halby, sum er sangari í bólkinum Johnny DeLuxe.

- Eg havi verið tónleikari í Føroyum í 22 ár og vil gjarna koma víðari við mínum tónleiki. Tað er avmarkað, hvussu nógv longur eg kann koma í Føroyum, so her var ein møguleiki, sum eg tók av, sigur Jens Marni Hansen við heimasíðuna hjá DR.

### Kanska tveir føroyskir finalistar

Danska Grand Prixið verður í ár hildið í Aalborg, og tað verður sum vant sjónvarpað beinleiðis leygarkvøldið 6. februar. Jens Marni skal kappast við fleiri hálvkendar sangarar. Ein av teimum, sum føroyingar helst kenna best, er Bryan Rice, sum hevði eitt risahitt við sanginum No Promises fyri nøkrum árum síðani. Ronan Keating spælir eisini ein leiklut í Grand Prixnum hesaferð. Hann hevur skrivað tveir av sangunum, sum skulu taka lut.

Jens Marni heldur seg hava góðan møguleika at røkka heilt fram at fremsta plássi í kappingini.

- Sangurin sparkar reyv, og tað sær lovandi út við okkara framførslu, so eg rokni við, at eg kann koma upp í toppin, sigur Jens Marni.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | -1 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -6 |
| Keypmannah. | -4 |
| Helsinki | -17 |
| Moskva | -7 |
| Berlin | -5 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | -4 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | -7 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 9 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1035 hPa. Yvir Suður-Noreg fer spakuliga eystureftir og viknar. Eitt stormlágtrýst, 967 hPa. Í útsynning vestan úr Írlandi fer spakuliga í útnyrðing .

**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í útnyrðing. Brúgvalagið haðani kemur spakuliga hendavegin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/01 kl. 06⁰⁰ – 08/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,6°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 10 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. januar: Mánin næstur jørðini
3. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Seinna kvarter
15. januar: Tendring
17. januar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 12. jan | 04:20 | 16:45 | 03:20 | 15:45 | 03:35 | 16:00 | 06:20 | 18:45 | 07:20 | 19:45 | 02:35 | 15:00 | 01:35 | 14:00 | 04:35 | 17:00 | 05:35 | 18:00 | 04:05 | 16:30 | 05:20 | 17:45 |
| 13. jan | 05:09 | 17:34 | 04:09 | 16:34 | 04:24 | 16:49 | 07:09 | 19:34 | 08:09 | 20:34 | 03:24 | 15:49 | 02:24 | 14:49 | 05:24 | 17:49 | 06:24 | 18:49 | 04:54 | 17:19 | 06:09 | 18:34 |
| 14. jan | 05:58 | 18:22 | 04:58 | 17:22 | 05:13 | 17:37 | 07:58 | 20:22 | 08:58 | 21:22 | 04:13 | 16:37 | 03:13 | 15:37 | 06:13 | 18:37 | 07:13 | 19:37 | 05:43 | 18:07 | 06:58 | 19:22 |
| 15. jan | 06:45 | 19:09 | 05:45 | 18:09 | 06:00 | 18:24 | 08:45 | 21:09 | 09:45 | 22:09 | 05:00 | 17:24 | 04:00 | 16:24 | 07:00 | 19:24 | 08:00 | 20:24 | 06:30 | 18:54 | 07:45 | 20:09 |
| 16. jan | 07:29 | 19:50 | 06:29 | 18:50 | 06:44 | 19:05 | 09:29 | 21:50 | 10:29 | 22:50 | 05:44 | 18:05 | 04:44 | 17:05 | 07:44 | 20:05 | 08:44 | 21:05 | 07:14 | 19:35 | 08:29 | 20:50 |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo